# Norðlýsið gongur nýggjar leiðir

**Eftir 90 ár sum lokalblað við einari útgávu um vikuna gongur Norðlysið nú nýggjar leiðir. Fyrsta ókeypis týsdagsútgávan er longu komin, og skjótt fer Norðlýsið at dekka ein part av Eysturoynni eisini**

NÝTT BLAÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Týskvøldið fingu norðingar og partur av Eysturoynni eitt ókeypis eintak av Norðlýsinum í postkassan. Blaðið var tað fyrsta í eini ætlan hjá einasta lokalblaðnum í Føroyum at brynja seg til framtíðina og troyta nýggjar møguleikar á føroyska blaðmarknaðinum.




*Týskvøldið kom fyrsta eintakið av nýggja Norðlýsinum í postkassarnar hjá norðoyingum og einum parti av Eysturoynni*

### Hvat er lokalt?

Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum sigur, at teir í mong ár hava tosað um at geva blaðið út tvær ferðir um vikuna. Av ymsum orsøkum hava teir higartil ikki hildið tað verið ráðiligt við tveimum útgávum, men nú Norðoyatunnilin skjótt verður veruleiki, merkir tað eisini nýggjar møguleikar fyri eitt blað, sum Norðlýsið.

– Eg trúgvi, at við fasta sambandinum skulu við fyrireika okkum uppá, at eitt hugtak sum lokalsamfelag fær ein øðrvísi týdning, enn tað higartil hevur havt her norðuri. Frástøðan millum til dømis Klaksvíkina og norðara partin av Eysturoynni verður so lítil, at fólk nátúrliga fara at hava ein áhuga í tí, sum fer fram hinumegin tunnilin, sigur Oliver.

Í fyrsta umfari fer týsdagsútgávan av Norðlýsinum at vera ókeypis, har størst dentur verður lagdur á lýsingartilfar. Hetta hevur leiðslan á blaðnum mett vera neyðugt fyri at kunna klára seg í kappingini við hinar ókeypis blaðútgávurnar, sum longu eru á marknaðinum.



*– Klaksvíkingar missa ikki sítt gamla lokalblað, men fáa heldur eitt størri Norðlýsið í framtíðini, sigur Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum*

### Eitt størri Norðlýsið

Longu nú arbeiða teir á Norðlýsinum við at gera tíðindi og frásagnir úr Eysturoynni, sum eisini verða partur av týsdagsútgávuni av blaðnum. Ì hesum sambandi er redaktiónin víðka við einum blaðfólki, men enn eru ongar ætlanir um at lata upp eina deild av Norðlýsinum í Eysturoynni.

Redaktónin hjá Norðlýsinum verður verandi í Klaksvík, tí ein koyritúrur uppá 10 minuttir fer ongan týdning at hava í so máta, heldur Oliver.

Størsta broytingin verður kanska, at eftir at Norðoyatunnilin er latin upp, verða báðar útgávurnar av Norðlýsinum savnaðar í einari stórari fríggjadagsútgávu.

*Vil hetta so siga, at norðoyingar missa sítt lokalblað?*

– Nei, als ikki. Tær lokalu søgurnar úr Klaksvík koma at halda fram, meðan tær úr Eysturoynni so koma afturat. Sum sagt, so verður tað ein spurningur, hvat ein lokal søga verður her norðuri í framtíðini. Eysturoyingar eru sum kunnugt longu byrjaðir at hyggja hendan vegin eftir vinnumøguleikum, og tann áhugin og áhugin fyri økjunum hjá hvørjum øðrum sum heild fer heilt vist at virka báðar vegir, sigur Oliver Joensen.

## Nýtt mannfólkablað?

**Herfyri fræ私ttist, at enn eitt blað var við at síggja dagsins ljós í Klaksvík. Enn eru ongar ítøkiligar ætlanir á borðinum, men tað er ikki óhugsandi, at føroysk mannfólk fara at fáa sítt egna blað**

**Mótspæl til Kvinna**

Klaksvíkingurin Rógvi L. Svøðstein sigur, at saman við øðrum hevur hann í eina tíð kannað føroyska blaðmarknaðin fyri at síggja, hvar tørvurin er størstur.

– Ætlanina um at geva eitt nýtt lokalblað út í Klaksvík fóru vit rættiliga skjótt burtur frá aftur. Tann marknaðurin er nokk ov lítil til at gerast áhugaverdur fyri okkum, sigur Rógvi, men leggur afturat, at enn eru nógvir ótroyttir møguleikar á føroyska blaðmarknaðinum.

– Seinastu tíðina hava vit spælt við tankan um at geva eitt mánaðarligt mannfólkablað út. Vit ímynda okkum, at blaðið kundi verið eitt mótspæl til Kvinna, við greinum um evni, sum hava áhuga hjá mannfólki, portettum, heilsusíðum o.s.fr, sigur Rógvi.

Enn liggja ongar ítøkiligar ætlanir á borðinum, men Rógvi er sannførdur um, at tørvurin fyri einum dygdargóðum blaði fyri føroysk mannfólk fyri 20 ár og uppeftir avgjørt er til staðar.

**ave**

## Kvinnulagnur í nýggjari skaldsøgu

**Dagny Joensen hevurjú givið út skaldsøguna Hvirlan, sum lýsir føroyskar kvinnulagnur undan seinna heimsbardaga**

NÝGGJ SKALDSØGA

Skaldsøgan sigur frá kvinnulagnum frá undan seinna heimsbardaga og til í dag.

Hvussu tilvildin ger seg galdandi, og lagnur umskarast. Brennivín og árinið á hússetrið fyrr og nú er somuleiðis ein aðaltráður í søguni. Serliga, hvussu hetta ávirkar børnini:

»Fanin taki teg, Anna, kemur tú ikki í stundini skalt tú fáa við meg at gera«, hóttir pápin, frá sær sjálvum í øðini.

Anna hvøkkur við. »Hatta reyvarholið, stendur og sveiggjar í rúsinum. Er ikki nóg mikið, sum er«, hugsar Anna.

Hon turkar sveittan av pannuni og hyggur upp á mammuna, sum framvegis ikki letst um vón. »Nei, har eg eingin hjálp at fáa«, mutlar Anna vónbrotin.

Søgan fevnir um fleiri ættarlið, sum eru merkt av teimum burturtreingingum, sum hava eyðkent føroyska samfelagið.



*Dagny Joensen*

Dagny Joensen: Hvirlan. Skaldsøgan er prentað og løgd til rættis á Føroyaprent. Ingálvur av Reyni eigur permumyndina og Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út. Bókin er 174 blaðsíður